# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2016

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 12. Des. 2017. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Jógvan Gregersen, formaður

Regin Mikkelsen, næstformaður

Jógvan Hansen

Jens Pauli Petersen

Marnar Pattinson

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

| | |
|---|---|
| Delta Seafood | Sandoy Seafood P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Nevið P/F |
| Scrabster Seafood | Faroe Origin P/F |
| Tavan Sp/f | Kósin P/F |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |
| Vestmanna Seafood | |

# Frágreiðing frá nevndini

*Um framtíðina hjá felagnum*

Broytingarnar, sum eru farnar fram í fiskivinnuni á landi seinnu árini, har stórur partur av virðisketuni er vertikalt integrerað, hevur eisini ávirkað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelagi. Vertikala integratiónin hevur merkt, at tað er torført at eyðmerkja tey reinu keyparaáhugamálini. Uppbýtið millum eitt ráfiskaseljarafelag, sum skal røkja áhugamálini hjá seljarasíðuni og eitt ráfiskakeyparafelag, sum skal røkja áhugamálini hjá fiskakeyparunum, samsvarar ikki við veruleikan í dag.

Nevndin hevur tí roynt at kanna áhugan fyri at gera eitt felag fyri alla botnfiskavinnuna, men má bara staðfesta, at áhugin ikki hevur verið nóg ítøkiligur, til at nakað úrslit spurdist burturúr.

Syndarliga gongdin í botnfiskafiskastovnunum, har vit nú í fleiri ár hava haft ein fiskiskap, sum er á sama støði ella verri enn í ringastu kreppuárum fyrst í 90'unum, hevur eisini merkt fíggarligu viðurskiftini hjá felagnum. Hall hevur verið fleiri ár á rað, og broytingar eru neyðugar. Nevndin heldur tað tó ikki vera ráðiligt at niðurleggja felagið, tí felagið hevur ein ognarlut í Kassamiðstøðini, og hevur harumframt ein nevndarsess í Fiskivinnuráðnum, har øll fiskivinnulóggáva kemur til ummælis.

Verandi gongd kann tó ikki halda fram, og nevndin heldur tað tí verða neyðugt at fáa undirtøku frá aðalfundinum til at uppsiga umsitingaravtaluna við Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Hetta merkir, at nevndin, tá avtalan er farin úr gildi, sjálv má skipa tað virksemið, sum verður, og finna umboð til sessirnar í eitt nú Fiskivinnuráðnum og Fiskivinnuroyndum. Vónandi fer at bera til at fáa meira orku til felagið í framtíðini, men við verandi útlitum er hetta óvist.

Nevndin heldur tó, at tað eru fleiri áhugamál hjá hesari vinnugreinini, sum tørvur er á hjá einum felagi at røkja, herundir:

- At sannføra myndugleikarnar um at brúka neyðugu orkuna til at betra um marknaðaratgongdina hjá føroyskum fiskaútflytarum.
- At skipa eina felags kunning um og marknaðarføring av føroyskum fiski
- At ávirka lóggávuna á økinum, herundir eisini heilsufrøðiligu lóggávuna
- At kunna um nýggjar reglur og gongdina á marknaðum

- At skipa eitt samstarv millum aktørar innan alla virðisketuna í føroysku fiskivinnuni, har fyritøkur hittast at viðgera spurningar av áhuga fyri alla vinnuna.

Hetta eru tó í stóran mun uppgávur, sum hava áhuga hjá allari vinnugreinini, ikki einans hjá ráfiskakeyparum.

*Gongdin í vinnugreinini*

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum var í 2017 7,6 mia kr. í mun til í 5,8 mia. kr. í 2013. Sostatt hevur verið talan um stóran vøkstur, har meginparturin av vøkstrinum tó stavar frá pelagiskum fiski og alilaksi.

Búskapargongdin hjá flakavinnuni á landi hevur seinnu árini verið merkt av vánaligu gongdini í botnfiskiskapinum. Um hugt verður at samlaðu vinnuni, er at kalla einki yvirskot í vinnugreinini, hóast úrslitini variera eitt sindur frá virki til virki.

Lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum eru seinastu árini vaksnar javnt úr 316 mió kr. í 2013 til 357 mió kr. í 2016. Ein lítil vøkstur hevur sostatt verið, men partur av hesum eru vanligar lønarhækkingar, og meira virksemi er eisini komið í uppisjóvarvinnuni í hesum árum. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Hóast samlaða feskfiskaveiðan er kvinkað eitt vet uppeftir seinastu árini, er hon tó framvegis á sera lágum støði. Støðan í rávørutilgongdini av vanligu botnfisksløgunum er syndarlig, og er væl minni enn í ringastu kreppuárunum fyrst í hálvfemsunum. Støðan í heimaflotanum er vánalig, og hóast onkur tekin hava verið um batar, er ov tíðliga at vænta nakra broyting.

Ymisk mál hava merkt virksemið hjá felagnum farna árið:

*Marknaðaratgongd*

Felagið hevur seinastu árini roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum, serliga í Suðuramerika og í Asia. Nakrir glottar hava verið, m.a. er fríhandilsavtala fingin í lag við Turkaland, og gongd er í málinum at fáa okkum betri marknaðaratgongd til Brasil.

Arbeiðið at fáa marknaðaratgongdina hjá føroyskum fiskaútflytarum á sama støði sum hjá okkara kappingarneytum verður ikki liðugt eftir einum ári. Ikki minst tí okkara

kappingarneytar brúka nógva orku uppá at betra uppaftur meira um sína marknaðaratgongd. Serliga hjá einum lítlum landi sum Føroyar, krevur tað eitt áhaldandi arbeiði frá føroysku myndugleikunum at sannføra myndugleikarnar í einum landi um at tey skulu nýta orku uppá handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur við Føroyar.

Royndirnar vísa, at tað tekur langa tíð at lata upp marknaðirnar fyri føroyskar fiskavørur. Tað er tí ov seint at taka samband við myndugleikarnar í hesum londum, tá trupulleikar eru á øðrum marknaðum, eitt nú ES-marknaðinum. Tað er neyðugt at arbeiða við at opna so nógvar av teimum áhugaverdu marknaðunum fyri føroyskar fiskavørur, so tað ber til at selja onnur støð, tá umstøðurnar á einum marknaði gerast truplar.

*Fiskivinnunýskipanin*

Nevndarlimir í felagnum hava í árinum luttikið í vinnuliga fylgibólkinum í sambandi við Fiskivinnunýskipanina.